# Turt í Danmark

Tað regnaði bara 33 millimetrar í Danmark í síðsta mánað, og tað ger, at hetta var tann turrasti oktober síðani 1972, sigur danska veðurstovan. Tað árið var oktober óvanliga turrur, og tá komu bara 16 millimetrar niður. Eitt meðalár er avfallið í oktober 76 millimetrar. DMI sigur, at tað turra veðrið í oktober komst av liggjandi hátrýsti tað mesta av mánaðinum, og at í veruleikanum regnaði tað átta dagar, meðan tað vanliga er 16 dagar.



# Eivør í Hoydølum

Hóskvøldið 8. november verður konsert við Eivør Pálsdóttir og orkestri í Aulini í Studentaskúlanum í Hoydølum. Við Eivør á pallin fara, Edvard N. Debess, Rógvi á Rógvu, Benjamin Petersen, Ása Wraae, Graham Henderson og Chris Hertzberger. Graham og Chris vóru báðir við á G! festivalinum og á konsertunum í Írlandi í august. Ása Wraae sang við Eivør fyri fyrstu ferð á G! og hevur síðan verið við Eivør á fleiri konsertum. Atgongumerki til koncertina í Hoydølum kunnu keypast á Kunningarstovuni í Havn og Kunningarstovuni í Runavík frá mánadegnum 29. oktober. Tað er avmarkað atgongd, verður sagt í tíðindaskrivi.

# 16 tons av kopari á kirkjute



*Útsýnið úr Hoyvíks kirkju er av tí allarbesta*

**– Tað er langt ímillum, at kirkjur verða bygdar í Føroyum, og eg vil siga, at tað hevur verið meira hátíðarligt og tignarligt hjá monnum at gingið inni í eini kirkju og arbeitt, enn tað er at ganga inni í einum goymslubygningi. Vit vita, at hetta er ein bygningur, sum er nakað serligt – ein varði í nútíðini og fyri eftirtíðina. Tí hevur byggingin verið nakað serligt, og okkara fólk hava lagt sálina í hesa verkætlan, sigur stjórin í Articon, Jón Danielsen**

**HOYVÍKAR KIRKJA**

*Orð: Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Úti í durinum í nýggju Hoyvíkar kirkju mikudagin hittu vit stjóran í fyritøkuni, sum hevur bygt Hoyvíkar kirkju – heilt úr moldini og upp til himmals, um vit so kunnu siga.

Øll eru samd um, at kirkjan í Hoyvík er eitt meistaraverk.

Er tað soleiðis, at tit hava følt tykkum at arbeitt á einum øðrum "plani", nú tit hava bygt eina kirkju – ella hevur nakað serligt verið yvir hesum arbeiði í mun til øðrum arbeiðum, tit gera?

– Jú, tað noyðist eg at ásanna. Hetta hevur verið meira hátíðarligt og tignarligt. Tað er stórur munur á at byggja eina kirkju – og so at byggja ein tilvildarligan goymslubygning. Vit vita, at tað verður nógv fokus sett á ein kirkjubygning, og tí hava okkara fólk gjørt sær serliga stóran ómak við hesum. Eg vil siga, at tað liggur líkasum ein sál í øllum tí, sum er gjørt.

Jón sigur, at tað hevur verið ein stór og áhugaverd uppgáva og avbjóðing at byggja eina kirkju.



*Hoyvíkar kirkja er ein varði, sum bæði núlivandi og okkara eftirkomarar kunnu frøast um. – Vit eru blivin góð við kirkjuna, tí hetta er okkara kirkja, sum Jón Danielsen, stjóri í Articon, tók til*

– Men vit høvdu einki havt ímóti, at roynt hetta aftur, um høvið beyðst.

Hann vísir á, at Hoyvíkar kirkja er eitt føroyskt handverk.

– Vit hava verið eini 20-30 mans, tá ið vit hava verið flestir og talið av arbeiðstímum, sum er farið til kirkjuna, liggur millum 50.000 og 60.000, sigur stjórin í Articon.

## Við stoltleika

Á samkomuni mikudagin, tá ið Jón Danielsen formelt handaði Jákupi Símun Simonsen lyklarnar til kirkjuna, segði stjórin í byggifyritøkuni, at tað er við sorgblídni, gleði og ikki sørt av stoltleika, at felagið nú hevur handað kirkjuráðnum og bygginevndini lyklarnar.

– Jú, hetta er fyri okkum ein merkisdagur, nú nýggja kirkjan, sum vit í felag hava skapt, stendur liðug. At hetta er eitt felagsavrik, ber kirkjan boð um, bæði tá ið ræður um tað byggilistarliga, handverkið og ikki minst, tá hugsað verður um verkætlanartilgongdina í síni heild.

Jón vísti á, at slík avrik verða ikki framd í sjálvdrátti, men bert við góðum samstarvi millum allar partar, og soleiðis hevur tað eisini verið við hesi verkætlan.

– Við samstarvi, siðiligheit, nærlagni og ídni frá øllum pørtum, hava vit við okkara starvsfólki saman við byggiharra, byggileiðara, arkitektum, ráðgevarum, okkara undirarbeiðstakarum og teirra arbeiðsfólki nátt at kalla øllum teimum málsetningum, sum vit fyri umleið tveimum árum síðan settu okkum fyri.

## Beinrakin orð

Hann segði, at tað er í slíkum samstarvi, at hvør einstakur kann gera so ómetaliga stóran mun, og í hesum sambandi endurgav hann nøkur orð, sum ein danskur vinnulívsmaður einaferð skal hava sagt: "Den der har evnen, har pligten...".

– Beinrakin orð, sum siga okkum, at vit hvør í sínum lagi – við evnum frá skaparans hond – hava eina skyldu til at koma við okkara íkasti til tað, sum vit nú einaferð eru í holt við.

Jón segði, at undir allari byggingini hava øll, sum knýtt hava verið at hesi verkætlan, givið sítt íkast.

– Tí skulu tit øll – høg sum lág – hava stóra tøkk fyri hetta. Uttan íkast frá øllum pørtum hevði verið tungt at nátt málinum, legði hann aftrat.

## 16 tons av tekju

Á tíðindafundinum lýsti stjórin í Articon til stuttleikar, hvat tað í rúmmetrum, fermetrum og tonsum hevur merkt at fremja eina slíka verkætlan.

– Eftir at sjálvur grundarsteinurin til kirkjuna varð lagdur 20. juli 2005, fóru vit undir útgrevsturin 5. september sama ár. Sjálvt betongarbeiði byrjaði fyrst í desember 2005 og varð liðugt í august 2006. Síðan varð arbeitt upp á yvirtromina í september, og 20. oktober 2006 stóð Hoyvíkar kirkja reist.

Jón vísti á, at byggifyritøkan hevur grivið og flutt umleið 6000-7000 rúmmetrar av tilfari í sambandi við útgrevstur og planering. Teir hava forskallað og stoypt umleið 900 rúmmetrar av betongi og hava brúkt umleið 65 tons av stáli.

– Vit hava sett upp umleið 850 fermetrar av Gustavspanelum, og á tekjuna eru løgd umleið 16 tons av kopari, segði hann fyri at nevna nøkur av arbeiðunum, sum eru partur av verkætlanini.

## Hevur gingið væl

Jón segði, at Articon hevur